# ikafelag vann




liliga uppiborin, og bæði í tekniska og listarliga støðinum var liðið væl framman fyri hini



*Nógv varð gjørt burtur úr búnum og smyrsli. Her er tað liðið hjá Støkk, sum hevur framførslu*



*Eisini B-liðið hjá Havnar fimleikafelag var sera væl fyri á tekniska økinum*

kappingina og sostatt eru fyrstu føroyameistararnir í estetiskum fimleiki nakrantíð. Genturnar í liði A hjá Havnar Fimleikafelag fingu 15,22 stig. Hini trý liðini vóru sera jøvn; einans 0,51 stig vóru frá nummar tvey til fýra. Støkk gjørdist nummar tvey við 13,73 stigum, á triðja plássi varð Ljósið við 13,43 stigum, og Havnar Fimleikafelag B gjørdist nummar fýra við 13,22 stigum.

## Trý lið til HM

21. mars fara trý lið úr Føroyum til Estlands at kappast um heimsmeistaraskapin í estetiskum fimleiki. Liðini eru frá Havnar Fimleikafelag, Støkk og Ljósinum. Eisini fara tveir dómarar, Elna Johansen frá Støkk og Beinta Danielsen frá Havnar Fimleikafelag, at døma fyri fyrstu ferð sum altjóða dómarar.

Áskoðararnir fingu eina helt serliga uppliving fríggjakvøldið. Tað sást, at bæði fimleikarar og venjarar hava gjørt eitt megnar arbeiði hetta seinasta árið. Hugaligt var at síggja, at fimleikurin her á landi veruliga hevur lyft seg uppá eitt altjóða støði. Eftir kappingini at døma kunnu vit veruliga vænta okkum nógv av okkara gentum til HM.

Sigast kann ikki annað enn, at fimleikurin í Føroyum hevur nógvar stórar og spennandi avbjóðingar fyri framman, bæði her heima og úti í stóru verð.

## FAKTA

**Úrslitini vóru hesi:**

| Nr. | Felag | Tøkniligt | Listarligt | Framførsla | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HF a | 4,60 | 2,55 | 8,07 | 15,22 |
| 2 | Støkk | 3,70 | 2,10 | 7,93 | 13,73 |
| 3 | Ljósið | 3,90 | 1,80 | 7,73 | 13,43 |
| 4 | HF b | 4,05 | 1,70 | 7,47 | 13,22 |